## Nýggir filmar hesa vikuna

**Støð**
Filmsheiti, **Dagur/ar** ***(klokkutíð)***

**Svf**
- Eitt blómutyssi – amerikanskur kærleiksfilmur, **02.** ***(21.30)***
- Vandamikil vitan – am. spenningsfilmur - Óhóskandi fyri børn, **02.** ***(22.55)***
- Gullfepur – s/h Charles Chaplin filmur frá 1925, **04.** ***(13.25)***
- Spartacus – am. klassikari - Óhóskandi fyri smábørn, **06.** ***(21.20)***

**3+**
- Leivdirnar av degnum, **05.** ***(20:35)***
- Tey úr St. Elmo, **06.** ***(19:00)***
- Trial and Error, **07.** ***(19:00)***

**BBC Prime**
- Cruise Of The Gods, **02.** ***(20:00)***
- Deceit, **04.** ***(22:50)*** **05.** ***(20:00)***
- Harra tjóvurin, **04.** ***(21:50)***

**Canal+**
- 2. Veraldarbardagi - Stillið áðrenn stormin, **06.** ***(21:55)*** **08.** ***(14:10)***
- 24 Hour Party People, **07.** ***(21:55)*** **08.** ***(8:45)***
- Dark Blue World, **08.** ***(19:00)***
- Maðurin í grannagrøvini, **03.** ***(19:00)*** **04.** ***(6:50)***
- Tom og Thomas, **05.** ***(20:00)***
- Tordenbuks, **04.** ***(15:00)*** **06.** ***(9:00)***

**Canal+Blå**
- Tom og Thomas, **06.** ***(17:30)***
- Tordenbuks, **05.** ***(17:30)***

**Canal+Gul**
- Tom og Thomas, **07.** ***(7:35)***

**DR 1**
- Gumma Charles, **03.** ***(19:40)***
- Harlequin: Trupulleikin við monnum, **05.** ***(21:00)***
- Hooper - Hørð hús um allan kroppin, **02.** ***(23:30)***
- Jagstraður - Agent 007, **08.** ***(21:00)***
- Kærleiki og lygnir, **03.** ***(22:55)***
- Lítla prinsessan, **04.** ***(9:00)***

**DR 2**
- Ein seljari við súsi í , **02.** ***(21:50)***
- Fylgd av fortíðini, **05.** ***(19:30)***
- Miss Marple: Steinrunnað andlitið, **03.** ***(15:10)***
- Rhinemann-afferan, **06.** ***(19:45)***
- Selskapsferðin, **02.** ***(19:30)***

**Hallmark**
- Pudd'nhead Wilson, **08.** ***(5:00)***
- The Mysterious Stranger, **06.** ***(8:30)***

**TCM**
- Shadow of the Thin Man, **04.** ***(8:05)***

**TV 2 zulu**
- Highlander - hin ódeyðiligi, **07.** ***(19:00)***
- Highlander 2 - endaliga stríðið, **08.** ***(19:00)***
- Summarið hjá Frankie, **02.** ***(1:05)***

**TV 3**
- Brúgvarnar í Madison County, **06.** ***(20:45)***
- Funny farm, **03.** ***(19:00)***
- Politiskolen 6, **02.** ***(19:00)***
- Solo, **04.** ***(22:45)***

**TV-1000**
- Gilda Radner: It's Always Something, **02.** ***(19:00)***
- Liberty Stands Still, **02.** ***(16:50)***
- Murdered Innocence, **06.** ***(4:30)***
- Nothing in Common, **05.** ***(19:00)***
- Once Upon a Time in the Midlands, **04.** ***(19:00)***
- Resident Evil, **03.** ***(19:00)***
- The X-team, **02.** ***(2:30)***
- Øri nøtuknekkarin, **03.** ***(14:40)***

**TVDanmark1**
- Back In Business, **03.** ***(0:35)***
- BASEketball, **02.** ***(20:00)***
- Exodus, **03.** ***(12:15)***
- Greystoke: Søgan um Tarsan, apunnar kongur, **02.** ***(14:40)***
- Jungleground, **04.** ***(23:20)***

**TVDanmark2**
- Vandamikil dómur, **03.** ***(19:50)***

**Fríggjadag 2. kl. 18.00**



### Simpsons - Viva Ned Flanders
Misnøgdur við tey seinastu seks keðiligu ártíggjuni í síni tilbakarhildnu og sparnu tilveru, biðir Ned Flander Homer um hjálp til at fáa ein neista aftur í lívið. Homer fer so við honum til Las Vegas, men ætlanirnar ganga ikki út. Teir báðir giftast við tveimum súrum servitrisum.

**Fríggjadag 2. kl. 19.00**



### Greivin av Monte Cristo
CANAL+
Edmond Dantes sitir í fongsli, tí vinur hansara sveika hann orsaka av eini kvinnu. Eftir ellivi ár eydnast tað honum at flýggja. Nú gerst hann kendur sum tann gátufulli og hevnandi greivin.

**Fríggjadag 2. kl. 19.00**



### Løgregluskúlin 6
Eitt nýtt harkalið herjar býin. Teir stjala og smykkur og aðrar virðislutir. Nú eru tað okkara kæru løgregluvinir, ið skulu steðga hesum brotsmonnum. Samstundis eru teir eftir brotsmannaleiðaranum í býnum. Hesin leiðarin hevur einans eitt endamál: at hevna seg inn á býin.

**Fríggjadag 2. kl. 22.55**



### Vandamikil vitan
Í embætinum skjýtur ein royndur løgreglumaður ein rúsevnasølumann úr Puerto Rico. Ein ungur ákæri skal kanna málið og varnast skjótt, hvussu rotin skipanin er, sum hann arbeiðir í. Skjótt verður hann hóttur við lívinum.

**Leygardag 3. kl. 17.00**



### Í sjeynda himli
Eric og Annie skilja ikki, hvussu tað eydnaðist Mary at gjalda fyri rokingina á kreditkorti hennara. Ímeðan royna børnini at villleiða tey í teirri kanning av málinum. Tá foreldrini finna kelduna til pengarnar hjá Mary, verða tey noydd at seta tiltøk í verk.

**Leygardag 3. kl. 18.25**



### La Liga: Real Madrid - Murcia
Beinleiðis av Santiago Bernabéu í Madrid. Heimaliðið, Real Madrid, hevur vunnið allar dystir sínar á heimvølli. M.a. er danin Daniel Jensen við í hópinum hjá Real. Botnliðið Murcia hevur tó skapt nakrar hvøkkir í sponsku Primera División.

**Leygardag 3. kl. 19.00**



### Maðurin í grannagrøvini
CANAL+
Desire og Benny møtast av tilvild á einum kirkjugarði. Hon er júst vorðin einkja, og hann hevur júst arvað bóndagarðin hjá foreldrunum sínum. Søtur tónleikur ljóðar og kærleikin grør, hóast tey bæði eru sera ymisk.

**Leygardag 3. kl. 21.20**



### Kanska sek 1:2
Anita Harris upplivir ringastu marruna hjá einari mammu, tá fimm ára gamla dóttir hennara knappliga hvørvur av spæliplássinum, har hon býr. Saman við makanum Peter leitar hon til fánýtis eftir Julie Anne, og til endans fara tey ta tungu leið til løgregluna. Pat North, politiovasti setir í verk eina umfatandi leiting, men gentan er ongastaðni at finna.

**Sunnudag 4. kl. 13.25**



### Gullfepur
Í 1898 finna tey gull í Alaska, og landastrokið Chaplin setir kósina norðureftir eins og nógvir aðrir ævintýrarar. Her hendir bæði eitt og annað, t.d. tá hann næstan deyður í hungri fyrst kókar sín egna styvla og síðani etur hann. Men aftaná tógvið stríð er eydnan við honum.

**Sunnudag 4. kl. 19.00**



### Jackie Brown
Flogternan Jackie verður handtikin við narkopengum uppi á sær. Hon endar ovast á deyðslistanum hjá gangstaraleiðaranum. Men hon setir í verk eina snilda ætlan, har hon má snýta bæði løgregluna og narkobandan. Ein filmur av Quentin Tarantino.

**Sunnudag 4. kl. 19.00**



### Krøniken
Nýggja dramarøðin í 24 pørtum á Dr1. Árið er 1949 og fýra ungfólk, ið øll hava stórar ætlanir fyri lív teirra. Í tíðarskeiðinum frá 1949 til 1972 verður fylgt við dreymum, ósigrum og sigrum teirra.

**Sunnudag 4. kl. 20.00**



### Rush Hour
Tá kinesiski konsulurin sær, at FBI ikki megnar at bjarga døtur síni, sum er burturflutt, leigar hann í staðin ein Hong Kong-løgreglumann. Men fyri at avgreiða málið til fulnar verður Hong Kong-løgreglumaðurin noyddur at ganga við til eitt heldur óvanligt samstarv.

**Mánadag 5. kl. 18.30**



### Frasier
Frasier og Kate vakna upp í ørmunum á hvøreðrum. Tey hata seg fyri hesa gerð, men samstundis dáma tey tankan um tað forbodna. Seinni á støðini kunnu tey ikki stýra litinskapi teirra, men ov seint uppdaga tey at alt hetta verður útvarpað.

**Mánadag 5. kl. 18.35**



### Loyniligu kríggini hjá CIA (1:3)
Amerikanska fregnartænastan, CIA, bleiv stovnað, eftir álopið á Pearl Harbor. Men aftaná álopini á USA tann 11. septembur í 2001 fór mann at hugsa um at fregnartænastan ikki livdi upp til síni endamál. CIA var, í veruleikanum, nær við at vera deytt. Hvussu er hetta hent?

**Mánadag 5. kl. 20.00**



### Tom and Thomas
CANAL+
Tað eru jól í London, tá lítli Tom flýggjar úr einum barnaheimi og endiliga eftir 9 ár møtir tvíburðabróðuri sínum Thomas. Eingin veit av, at tað eru tveir brøður, ið líkjast akkurát. Dreingirnir kunnu so býta um pláss í skúlanum og heima.

**Mánadag 5. kl. 21.45**



### Apur - vatnapur
Mennniskjað hevur altíð roynt at temja apurnar, sum líkjast okkum so nógv, og Buddha gav apunum pláss í stjørnukalendaranum. Tær apur, sum eru hoyra til í vatntekninum eru orangutangurnar og næsaapurnar í regnskóginum í Borneo, tær japansku makakapurnar og tær yndisligu gibbonapurnar.

**Týsdag 6. kl. 18.00**



### Pyjamasbananirnar
Røð í yvir hundrað pørtum til tey smáu børnini við føroyskari talu. Sendast hvørt týskvøld og mikukvøld og sunnumorgun. Tær báðar B1 og B2 eru saman við Lulu, Amandu, Magnus og Rottu hvørt týskvøld og mikukvøld klokkan seks og sunnumorgun.

**Týsdag 6. kl. 19.00**



### Eg eri Dina
Filmurin er grundaður á skaldsøguna "Dinas bok", sum Herbjørg Wassmo hevur skrivað. Dina er vøkur og ein serlig ung kvinna, ið verður plágað av, at hon sum barn, óbeinleiðis, var orsøk til at mamman doyði. Hetta hevur faðir hennara ongantíð fyrigivið henni.

**Týsdag 6. kl. 20.45**



### Brúgvarnar í Madison County
Summar er, og lívið hjá tí heimagangandi Francesca (Meryl Streep), hvørs lív er nakað einsformað, fær ein hvøkk, tá myndamaðurin Robert Kincaid (Clint Eastwood) tilvildarliga kemur framvið. Hann skal taka myndir av brúgvunum í Madison County og er vilstur.

**Týsdag 6. kl. 21.55**



### 2. Veraldarbardagi - stillið áðrenn stormin
CANAL+
Filmur um hjúnarbandið millum Winston Churchill og Lady Clementine. Áðrenn kríggið vóru tað fá, ið lurtaðu eftir hansara ávaringum um nasistanna framferð og um ta fíggjarlig kreppu, sum gav honum tunglyndi.

**Mikudag 7. kl. 19.00**



### Loser
Paul er noyddur at arbeiða nógv fyri ikki at verða tveittur úr skúlanum. Hetta ger hann til ein tapara ímillum sínar veitslufegnu sambúgvum. Men so møtir hann tí vøkru Doru og brádliga sær alt so ljóst út - munnu tey fara at finna eydnuna saman?

**Mikudag 7. kl. 19.55**



### Tað deyva barnið
Natasja er fødd deyv. Sum deyv lærir hon teknmál fyri at samskifta við umheimin. Og hun dugir rættiliga væl, men fær hon eina Cochlear Implant skurðviðger, verður tað gjørligt hjá henni at hoyra og tosa, altso at samskifta á ein heilt annan hátt. Viðgerðin kann geva Natasju ein sans, hon ikki er fødd við.

**Mikudag 17. kl. 20.00**



### South Park - Størri, longri og ósensureraður
Dreingirnir úr 3. flokki: Stan, Kyle, Kenny og Cartman eru millum íbúgvarnar í South Park. Her liva teir eitt rættiliga harðligt lív við happing og tí sum verri er. Tey vaksnu í South Park er lítið skilagóð og ikki kensluborin. Dreingirnir hava tað best saman og eisini saman við teirra kanadisku idolum, Terrance & Phillip.

**Mikudag 7. kl. 21.55**



### 24 Hour Party People
CANAL+
Tony Wilson byrjaði plátu felagið Factory í Manchester 1976. Millum tónleikararnar vóru Sex Pistols og New Order. Teir gjørdu kollveltandi tónleik, sum enn er væl dámdu. Hetta er søgan um Tony Wilson og tónleikin, ið hann skapti.

**Hósdag 8. kl. 19.00**



### Dark Blue World
CANAL+
Týskland hertekur Tjekkoslovakia. Fleiri av landsins flogskiparum flýggja til Onglands. Fylgt verður við teirra tíð í Onglandi og, tá teir koma heimaftur, har fleiri av teimum verða settir í geglið undir illgruna fyri antikommunistiskt virksemi.

**Hósdag 8. kl. 21.00**



### Veiddur - Agentur 007
Røðin við James Bond filmum hjá Dr1 heldur fram. James Bond verður lokkaður til Istanbul av tí vøkru Tatianu, ein russiskur KGB-agentur. Men tann harðrendi Blofeld hevur sínar ætlanir og hevur samvitskuleysar agentar, ið arbeiða við málinum.

**Hósdag 8. kl. 22.45**



### The Tonight Show við Jay Leno
Í fótsporum Steve Allens, Jack Paars og Johnny Carsons fylgir Jay Leno, sum ein undirhaldandi late-night vertur. Í mei 2002 kundi hann hátíðarhalda 10 ára dagin fyri hansara prátsendingar við kendum gestum. Gestir eru: Elijah Wood, Jennifer Tilly og tónleikurin kemur frá Counting Crows.

**Hósdag 8. kl. 21.20**



### Okkara kokkar 9
Kristvin fær í hesari sendingini vitjan av kokkinum Leif Sørensen. Teir fara at borðreiða við filè av lambsryggi saman við ymiskum spennandi grønmetisrættum og bechamelsós. Omaná verður Cremefraichè flandessert og fruktir.

## Ítróttur

CANAL+
**Canal+**
Sunnudagin kl. 20.00
NHL: Caroloina-Phoenix
Týsdagin kl. 19.55
Premier League: Aston Villa-Portsmouth
Mikudagin kl. 19.55
Premier League: Chelsea-Liverpool
Mikudagin kl. 0.30
NHL: Detroit-Boston

**Canal+ Blå**
Mánadagin kl. 14.00
NHL: Carolina-Phoenix
Týsdagin kl. 13.55
Seria A

**DR1**
Sunnudagin kl. 15.20
Hondbóltur: Ikast/Bording-Podorica, kvinnur
Mikudagin kl. 20.50
Hondbóltur: Randers-Slagelse, kvinnur

**Eurosport**
WC Sprint úr Reit im Winkl, Týsklandi
WC Skíðlop úr Schonach, Týsklandi
WC Snirr úr Megeve, Fraklandi
WC Skíðskjóting úr Pokljuka, Slovenia
ATP Tennis úr Doha, Quatar
OL-kval flogbóltur úr Leipzig, Týsklandi
OL-kval flogbóltur úr Baku, Aserbadjan
Rally Dakar

**TV2 Zulu**
WC Skíðskjóting úr Pokljuka, Slovenia
WC úr Stórsnirr úr Flachau, Eysturríki
FA Cup fótbóltur
NFL
Hondbóltur
Rally Dakar

**TvDanmark1**
Leygardagin kl. 18.25
La Primera
Sunnudagin kl. 21.50
NBA: Milwaukee-Washington
Sunnudagin kl. 19.55
La Primera



**VARPIÐ**

Eykablað í Sosialinum
hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 341800
Fax: 341801
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Umbróting: Hestprent